# Misjøvn Ólavsøkuframsýning



*Heðin Kambsdal: "Gjógv"*

**Støðið á Ólavsøkuframsýningini í ár rakk líka frá tí heilt góða til tað onkisigandi. Nógv tóktist at vera við av gomlum vana, meðan tað í onkrum førum kanska mest var nýggjheitin, heldur enn dygdin, sum hevði tryggjað verkinum eitt pláss á framsýningini**

Ólavsøkuframsýning
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Samanborið við undanfarin ár, vóru óvanliga fá listaverk sloppin við á árligu Ólavsøkuframsýningina. Tá avtornaði komu 55 verk upp at hanga, og heildarmyndin var tí ein opin og løtt framsýning, har áskoðarin hevði møguleika at savna seg um tað einstaka verkið.

## Gamalt og nýtt

Av okkara kendu málarum er Heðin Kambsdal ein av teimum, sum megnar at endurnýggja seg sjálvan næstan hvørja ferð. Hesuferð var tað serliga avlanga vertikala myndin "Gjógv", sum breyt frá í einum spennandi samspæli millum skap og innihald. Eisini myndirnar hjá Arnoldi Vegghamar kendust sum eitt frískt lot millum "gomlu" málarnar við sínum litfagra sermerkta stíli, sum framvegis tykist líka nýskapandi.

Kári Svensson hevði fimm málningar við hesuferð, allir við sama heiti "Hugbirting", men við sera ymiskum útrykki bæði í litum og stødd. Møguliga boða hansara blá- og turkislittu myndir frá onkrum nýggjum hjá málaranum. Settar saman við einum sera "lidnum" málingi við teimum fyri Kára meir eyðkendu jørðlitunum, høvdu bláligu myndirnar eitt brá av at vera eitt slag av forvitisligum kladdum.

Men burtursæð frá glottum, sum hesum, hevði tú sum heild eina kenslu av at hava sæð tað mesta fyrr á hesum partinum av framsýningini.

## Spæl ið siðvenju

Tað, ein saknaði av nýskapan hjá teimum kendu málararnum, fann áskoðarin harafturímóti hjá teimum yngru ella ikki so kendu. Av teimum 20 listafólkunum, sum vóru við í ár, vóru umleið helvtin við fyri fyrstu ferð.

Tormóður Djurhuus hevði tveir málingar við, har siðbundna myndevnið "Lomvigaberg" fekk ikki sørt av nýggjum lívi. At lata hvíta máling renna niðureftir løriftinum sum fuglaskvett er roynt fyrr, men á myndunum hjá Tormóði fara skvettini út um bjørgini sum fyri at viðmerkja, at hetta er ikki eitt fuglaberg, men eitt lørift. Nakað tað sama kanst tú siga um myndarøðina "Í Álvalandi", hjá Jóhan Martin Christiansen, har horisontala himmal/hav uppbýtingin verður brotin av nøkrum litføgrum neyvt teknaðum rundum plettum í einum originalum spæli við siðvenjuna.

Ikki færri enn tvær installatiónir og tríggir skulpturar vóru við á framsýningini. Listarliga góðskan var misjøvn, men smáu bronsumyndirnar hjá Eiriki Poulsen skaraðu framúr í handverksligari dygd.

Hóast fleiri av verkunum á Ólavsøkuframsýningini avgjørt høvdu sínar dygdir, var framsýningin sum heild sera misjøvn. Ov nógv av tí kenda tóktist vera við av gomlum vana, meðan ein hevði varhuga av, at tað var nýggjheitin, heldur enn dygdin, sum hevði tryggjað onkrum av teimum yngru eitt pláss á veggunum í Listaskálanum ólavsøkudagarnar.



*Eirikur Poulsen, "Revisor" (bronsa)*



*Kári Svensson: "Hugbirtingar"*



*Tormóður Djurhuus: "Lomvigaberg"*

# "Fokkjúfingurin" í Listaskálanum

**Fólk vóru sera ymisk á máli um, hvussu væl hann hóskaði har. Men ovurstóri "Fokkjúfingurin" hjá Sámali Blak slapp ígjøgnum nálareygað hjá nevndini, sum valdi verkini til Ólavsøkuframsýningina í Listaskálanum**



*Ovurstóri "Fokkjúfingurin" hjá Sámali Blak og 200 slapp ígjøgnum nálareygað hjá teimum, sum valdu verkini til Ólavsøkuframsýningina í ár*

Ólavsøkuframsýning
*anna@sosialurin.fo*

Nógv umrøddi "Fokkjúfingurin" hjá unga listamanninum Sámali Blak var upprunaliga gjørdur í sambandi við luttøkuna hjá bólkinum 200 á G-festivalinum, har hann eisini var at síggja seinast. Tað, sum vit ikki vistu, var, at verkið eisini hevur verið ein túr framvið hjá teimum, sum valdu út, hvørji av teimum 150 innsendu verkunum skuldu sleppa við á Ólavsøkuframsýningina í Listaskálanum í ár.

## Ein fingur til listaklandrið?

Ovurstóri, silvurlitti "Fukkjúfingurin" slapp gjøgnum nálareygað, og Ólavsøkudagarnar stóð hann so og mól runt í niðara salinum í Listaskálanum. Fingurin kann eisini blæsa eld og royk, men har høvdu tey á Listasavninum sett markið hesuferð.

Fólk vóru rættiliga ymisk á máli um, hvussu væl "Fokkjúfingurin" hóskaði á Listaskálanum. Ein kundi til dømis fílst á, at verkið er tikið úr sínum upprunaliga samanhangi, har tað var partur av eini tónleikaframførslu, og tí gevur lítla og onga meining millum hini verkini á Listaskálanum. Hinvegin, navnframi Marcel Duchamp tók jú sítt pissoir úr sínum nátúrliga samanhangi og setti tað á eitt listasavn - og varð harvið mettur at vera ein tann mest kollveltandi listamaðurin í fyrru helvt av farnu øld. Men, sum ein ummælari tók til, kanska var meininginum hjá Sámali Blak og teimum í 200 við verkinum at geva allari ósemjuni innan føroyska listaheimin fingurin.

Á Ólavsøkuframsýningini varð verkið lýst sum ein installatión við heitinum "Pappmasjéfokkjúfingurin # 3". Tilfarið er pappmasjé, træ, glas og jarn og tað eru Sámal Blak, Mikkjal Arge Galán og David H. Geyti, sum í felag standa aftanfyri verkið.